# Tí rýma fólk av landinum

HILMAR SIMONSEN



Her í Føroyum ýður í ólevnaði so sum porno og Ugens Rapport. Ei undur í at fólk ikki trívast og rýma av landinum. Vit hava nærum heimsmet í fólkafráflyting, fólkatalið í Føroyum stendur í stað, hóast burðaravlopið er av teimum hægstu í øllum Evropa. Hvar fara so øll hesi fólkini?

Tey rýma helst undan øllum ólevnaðinum í Føroyum at finna sær skjól í øðrum londum. Tey fara sikkurt har, sum eingin ólevnaður er, eingi pornobløð ella frí rúsdrekkasøla, og har tað er kravt við lóg, at tey skulu biðja fleiri ferðir um dagin. Hvat hevði tað ikki verið deiligt, um Føroyar vóru eitt tílíkt paradís, so høvdu nógv av hesum fólkum helst ikki rýmt.

Men Guds lukkutíð eru tað nakrir mergjaðir garpar, ið royna at stríðast fyri at bøta um hesi viðurskifti (ÚF, 6/10, kl. 18:00). Ein av teimum er formaður í Miðflokkinum, annar formaður í Sjálvstýrisflokkinum, og ein tríði ein fólkafloksmaður. Hetta eru mergjaðir menn, ið taka heimsins trupulleikar í størsta álvara. Teir bróta upp um armar og vilja stríðast fyri at hevja okkum burtur úr pornodíkinum, sum at Ugens Rapport er at fáa á bensinstøðum. Men um forboð fyri at selja nakin fólk á prenti ikki er nokk til at halda Pornoføroyar í skinninum, so fara teir gleðiliga eitt stig víðari, um teir fáa makt sum teir hava akt. Tað er at sensurera alnetið. Hvørki meir ella minni. Sensurur er sostatt ikki nakað, sum prestastýrið í Iran ella kommunistastýrið í Kina hava einkarætt upp á, nei, tað er nettup vegurin fram, halda teir. »At tað ber til at sensurera á alnótini hava kinverjar longu prógvað«, segði Jenis av Rana.

Vit eru óendaliga heppin, at vit eiga so mergjaðar menn sum Jenis av Rana, Kára P. Højgaard og Jákup Mikkelsen. Hvat hevur Várharra ikki veri framsíggin, tá hann setti hesar frelsandi einglar á fold í einum so glataðum landi sum Føroyar.

Latum okkum øll stuðla teimum í at steðga ólevnaði, og at forða fólki í sjálv at velja, hvat er best fyri tey. Tí tað er teir og ikki tey, sum vita, hvat er best fyri tey. Hesir eru teir (sjálv)útnevndu at døma millum livandi og deyð, skapa paradís í Føroyum og steðga massivu fólkafráflytingini. Tá ongar rumpur ella boppur meiri eru at síggja, hvørki á bensinstøðum ella á alnetinum, tá verður alt gott, øll verða glað, og eingin fer at rýma.

# Havnin má ganga undan

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri



Tórshavnar Kommuna eigur at ganga undan í Føroyum. Hon eigur at leggja dent á at kunna bjóða sínum borgarum eitt framkomið og áhugavert lív – bæði í útbúgving, arbeiðstíð og frítíð.

Hetta eru høg mál at seta sær, men so høg mugu tey vera, skulu Føroyar fylgja við í heimsmeldrinum, tí kappingarneytarnir hjá okkara høvuðsstaði eru ikki bygdirnar, men londini kring okkum við dragandi vinnumøguleikum og tølandi stórbýarlívi.

Líkt er til, at nógvir føroyingar, sum eru farnir uttanlands at útbúgva seg, vilja koma heimaftur, men spurningurin hjá mongum er, um nóg mikið er at koma heimaftur til.

Trivnaður og vinnumøguleikar eru tvær síður av somu søk. Tí stovnaði kommunan sína egnu vinnumenningardeild, sum var ein týðandi viðspælari í Job Match-átakinum í Keypmannahavn herfyri í royndunum at fáa tey útbúnu fólkini heim aftur at verða við til at taka tøkini í framtíðini.

Heili 70 prosent av útisetunum í Danmark, sum hugsa um at koma heimaftur, vilja búseta seg í Tórshavnar Kommunu, men teir hava fleiri ivaspurningar. Er skúlin nóg góður, eru frítíðarmøguleikarnir nóg fjølbroyttir, eru nóg avbjóðandi starvsmøguleikar, og hvussu við bústaðarviðurskiftunum?

Millum fremstu krøv hjá bæði heimafólki og útisetum er, at vit hava ein góðan skúla. Hetta ásannaði býráðssamgongan og setti út í kortið at útvega nýggjar skúlar í Hoyvík og á Argjum. Hesir skúlar eru lagdir til rættis eftir mest framkomnu grundreglum, so teir kunnu lúka tey krøv, sum fólkaskúlalógin setir.

Hesar byggingar fara at gera sítt til, at børnini fáa bestu karmar um eina framkomna skúlagongd.

Tað hevur eisini týdning fyri fólk í dag at kunna luttaka í einum fjølbroyttum frítíðarlívi og at hava góðar møguleikar fyri kropsrøkt.

Vit hildu, at tann stóra fólkaítróttin, fimleikurin, átti at fáa betri umstøður. Serliga børnini íðka nógvan fimleik, men strævið hevur verið hjá nógvum at sleppa upp í part, tí hølir hava vantað.

Sáttmáli er gjørdur um at byggja tríggjar fimleikahallir í einum bygningi í Gundadali, tvær hallir til rytmiskan fimleik og ein til amboðsfimleik burturav. Vónin er, at hallirnar fara at fáa eins stóran týdning fyri trivnaðin í býnum og svimjihøllin.

Vit settu okkum eisini fyri at gera ítróttarvøll til frælsan ítrótt, sum hevur verið saknaður leingi. Nú er hann liðugur og liggur klárur at taka ímóti øllum, sum hava hug at ganga, renna ella íðka aðra frælsa ítrótt.

Her eru nakrar av fyritreytunum fyri einum dragandi býi fingnar til vega, men fleiri mugu til. Skula miðnám og lestur á universitetsstigi mennast í høvuðsstaðnum, er umráðandi, at Tórshavnar Kommuna spælir við, har hon kann.

Ein av uppgávunum er at strongja á landsins myndugleikar um loksins at koma við teimum lógum, sum skula regulera møguleikarnar hjá fólki at útvega sær bústaðir, so eisini lesandi, ungar familjur, einligir forsyrgjarar og onnur við serligum tørvi kunnu seta búgv undir yvirkomiligum korum – ikki púra strongd av tyngjandi rentum og avdráttum.

# Heimføði

STEINGRÍMUR WEIHE
Hoyvík

Í Sosialinum 6. okt. 08 verður sagt frá eini sjúku, sum verður nevnd CTD (Carnitine Transporter Defect). Syrgilig sjúka.

Í somu grein verður sagt frá, at sjúkan helst stavar frá útbrøgdum. Hon er tí so vanlig í Føroyum. Eg veit ikki, hvat eitt útbragd er, men tíbetur er týðing sett í parantes - nevniliga mutatión. Hetta er eitt internationalt orð og verður brúkt bæði í útlendskum læribókum og millum fólk. Kemur upprunaliga úr latíni og merkir broyting. Eg fari at heita á journalistarnar á Sosialinum at royna at varðveita international orð í blaðnum. Tað ger málið ríkari, og vit sleppa undan misfostrum sum útbragd, (hóast kanska skilt við okkurt sagnorð). Eitt sindur minni heimføðilig verða vit eisini, um vit royna at brúka og fylgja upprunatýdninginum av internationalum orðum, sum verða almannabrúkt uttanlands.

Eisini fari eg at heita á mentamálaráðharran, Helenu Dam á Neystabø, at broyta alt orðatilfarið í skúlunum í matematik, fysik og kemi, so tær internationalu málreglurnar verða galdandi. Til frama fyri øll okkara sperdu børn, sum so kundu farið beinleiðis á internetið at funnið sær fleiri upplýsingar. Tað hevði hjálpt ómetaliga væl upp á trivnaðin.

William Heinesen skrivaði fyri nógvum árum síðan í Varðanum, at føroyingar áttu at leita sær víðskygni í Europa.

## At biðja fyri satan vold

Millíónavís týsku prestar
bóðu fyri Adolf Hitler og sí -
krossins merki blaktraði
víða um lond tað tíð.

Men heidnu hundar allieraðu seg
og manaðu krossins merki vekk -
innaftur í kirkir og missiónshús
prestum til ve og skrekk.

Og prestar biðja so bønliga
um dinosaurar og dagliga breyð -
ið er æviga útdeytt vanta
tí verð hjálpur ongin neyð.

***Hallur Andreasen***

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin